## Brekkubrothers við nýggjari útgávu

Brekku Brothers leggja í løtuni seinastu hond á komandi útgávu teirra, »From Boston to Tórshavn« ið plátufelagið Tutl gevur út í næstum. Fløgan er tikin upp i Airplay í Århus í samband við Brekku Brothers Nordic Relation Tour 2006. Á fløguni arbeiðir bólkurin víðari við verkætlanini, at læra tey, ið vanliga ikki lurta at jassi at elska jass, siga Brekku brøðurnir í tíðindaskrivi. Brekku Brothers Vol II kemur í handlarnar 7. september.



## Ráevni í Eysturgrønlandi

Grønmlendska felagið Nuna Minerals er í ferð við at kanna, hvørji ráevni eru at finna fram við grønlendsku eysturstrondini. Tær seinastu fimm vikurnar hava fólk hjá felagnum tikið umleið 1.000 ymsar royndir frá Tasiilaq og suðureftir, og tær skulu nú kannast. Jarðfrøðingurin Anders Lie, sum stendur á odda fyri kanningunum, sigur við útvarpið í Nuuk, at nakrar av royndunum eru áhugaverdar, og tí eru vónirnar góðar, sigur hann.

# enn skatt á fiskiflotan



*- Flestu skipabólkar hava ikki fíggjarliga orku til endurnýggjan, men hava so dánt pening til viðlíkahald og at seta skipini í stand. Lønsemi er einki at reypa av, og flotin verður ikki dagførdur, samstundis sum ársverkini fækka, sigur Bjarni Arnason*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Bjarni helt, at eitt samlað avlop upp á einar 34 miljónir krónur í 2005 er einki at reypa av.

- At eginognin minkar, avspeglar hinvegin ikki veruligu gongdina hjá flotanum, tí nógvar sølur hava verið, og hesar hava eisini ført til, at kapitalur er farin úr vinnuni.

Hann segði, at tað týdningarmesta er, at vinnan er »røsk« av savna pening, men tað hevur hon ikki verið nóg góð til seinastu árini.

- Í so máta liggur fiskivinnan næstan øll árini lægri enn aðrar vinnur.

Til stuttleikar nevndi hann, at eitt nú bakarar liggja ovarlaga, tá ræður um forrentning av vinnuligum virksemi.

### Veksandi veðskuld

- Soliditeturin hjá fiskiflotanum er góður hjá summum skipabólkum og minni góður hjá øðrum, men miðaltalið er 29,2%, og tað er ikki nøktandi. Vit kunnu ikki siga, at hetta er ein serliga sterk vinna. Millum bólkarnar er onkur, sum er væl fyri, og hesi skip toga miðaltalið uppeftir, segði Bjarni.

Hann vísti eisini á, at tá skip verða seld og keypt, soleiðis sum tað hevur verið seinastu árini, skulu tey sjálvsagt eisini fíggjast, og tá veksur veðskuldin.

- Skip og veiðiloyvi hava verið dýr seinastu árini í mun til tíðina beint eftir kreppuna, tá vinnutólini fóru fyri ein lutfalsliga bíligan pening.

Bjarni helt, at serliga pelagiski flotin hevur gjørt nógvar og spennandi íløgur.

- Tað gekk ógvuliga væl hjá hesum partinum av flotanum í fjør, bæði í nøgd og prísum, og tað var serliga prísurin, sum gjørdi útkastið.

### Stórar avbjóðingar

Bjarni Arnason segði, at við veksandi veðskuld í fiskiskipaflotanum og øktari rentu, kemur marknaðarrentan at merkja raksturin av flotanum.

Hann man soleiðis eisini við tey trý viðurskiftini, sum kunnu koma at merkja gongdina frameftir.

- Renta og olja ganga okkum ímóti, og dollarvirði hevur verið lækkandi og fer væntandi at lækka uppaftur meira. Lækkandi dollarin merkir, at tað gerst tyngri hjá eitt nú upsa at kappast á evropeiska marknaðinum móti pollokkinum úr dollarlondunum.

Hann legði tó aftrat, at kortini hevur upsaprísurin á evropeiska marknaðinum verið góður, og tað hevur í fyrsta lagi havt stóran týdning fyri partrolararnar og onnur før, sum veiða upsa.

- Fiskiflotin stendur tískil yvirfyri stórum avbjóðingum við hækkandi rentu, hækkandi oljuprísum, lækkandi dollarvirði – og at enda vantandi arbeiðsmegi.

### Tilfeingisrenta – nei!

Í framløgu síni segði Bjarni, at fiskiflotin als ikki tjenar »yvirnormalan profitt«, sum hann tók til.

Hann nam eisini við nógv umrøddu tilfeingisrentuna – ella tilfeingisgjaldið, ið afturvendandi hevur verið frammi í politiska kjakinum seinnu árini.

- Spurningurin er, hvat man ynskir við eini tilfeingisrentu? Royndir úr øðrum londum vísa, at slíkir skattir ikki hava gjørt tað lættari fyri fiskiflotan.

Hann helt, at soleiðis, sum gongdin hevur verið í seinastuni við, at virkir og skip í størri mun aftur eru savnað undir sama hatti, verður ikki lættari at praktisera eina tilfeingisrentu.

- Veiðiloyvi eru handlað, og spurningurin er, um keyparar skulu betala tvær ferðir fyri rættindini? Tað gevur væl onga meining.

Hann helt, at tað skapar ótryggleika í vinnuni og ger karmarnar ótryggari, tá áhaldandi verður tosað um at leggja hægri skatt á vinnuna.

- Spurningurin er eisini, um nóg nógvir keyparar verða á marknaðinum í framtíðini, tá karmarnir fyri tey vinnurekandi kunnu kennast so ótryggir og truplir.

Bjarni segði seg vera av teirri áskoðan, at myndugleikarnir ikki eiga at leggja meira skatt á vinnuna, men heldur eiga at fokusera upp á at geva vinnuni betri karmar at virka undir.

### Dagføringar

- Sjálvandi treingir ein og hvør skipan til dagføringar, og sum eg skilji Kjartan Hoydal, eiga vit bara at regulera veiðitrýstið, um tað broytist, men til tess er so eisini neyðugt, at vit kenna veiðitrýstið, segði Bjarni Arnason, eftir at Kjartan Hoydal í síni framløgu hevði eftirlýst teirri kanning ella gransking av veiðitrýstinum, sum ongantíð er gjørd.



*Á Føroya Sjómannadegi var Klaksvíkin enn einaferð vertur fyri stórari fiskivinnuráðstevnu, har »tungir« dreingir í vinnuligum høpi søgdu sína hugsan um gongdina í fiskivinnuni, bæði á sjógvi og landi*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*